Tryggingareftirlitið

**Tórshavn 30. januar 2024**
Journalnr.: 21/00365-142

**Tíðindaskriv**

**Øll tey føroysku lívstryggingarfeløgini og eftirlønargrunnarnir hava sjálvboðið gjørt eina sínámillum avtalu um betri kunning til tann einstaka kundan um teir kostnaðir, ið kundin rindar fyri sína eftirlønaruppsparing**

Avtalan er gjørd ímillum:
- P/F Tryggingarfelagið Lív
- P/F Betri Pensjón
- Eftirlønargrunnur Løntakaranna (Lívsverk)
- P/F NordikLiv Lívstryggingarfelag

Avtalan merkir, at einaferð um árið skal felagið á ein skipaðan hátt upplýsa einstaka eftirlønarkundan um, hvussu nógv hann hevur rindað í krónum og í prosentum fyri sína eftirlønaruppsparing. Feløgini hava sambært avtaluni bundið seg til at brúka sama uppgerðarhátt, og grannskoðararnir skulu tryggja, at feløgini halda avtaluna.

Avtalan kemur í gildi soleiðis, at í seinasta lagi 1. september 2024 skal einstaki eftirlønarkundin fáa upplýst, hvussu nógv hann í 2023 hevur goldið í krónum og í prosentum fyri sína eftirlønaruppsparing.

Avtalan fevnir ikki um eftirlønaruppsparing í peningastovnum.

Talan er so at siga um somu sjálvbodnu avtalu, sum lívstryggingarfeløg og tvørgangandi eftirlønargrunnar í Danmark hava um at fylgja sonevnda "*Omkostningshenstilling*" frá áhugafelagnum Forsikring & Pension, F&P.

Endamálið við skipanini er, at tað skal vera greitt, hvørjar kostnaðir kundin rindar fyri at hava sína eftirlønarskipan. Síðani 2010 hava øll donsk feløg, á ein skipaðan hátt, roknað og upplýst sínar eftirlønarkundar um ÁKK (árliga kostnaðin í krónum) og ÁKP (árliga kostnaðin í prosentum).

Nevndirnar og stjórnirnar í føroysku lívstryggingarfeløgunum og eftirlønargrunnunum hava verið samd um, at feløgini skulu miða eftir, at einstaki eftirlønarkundin fær eina kunning um kostnaðir, sum er á sama støði sum donsk feløg geva sínum eftirlønarkundum. Feløgini hava tí í samstarvi við Tryggingareftirlitið síðani 2018 arbeitt við at seta í verk eina samsvarandi skipan fyri føroysku eftirlønarkundarnar.

Í hesi tilgongdini hava feløgini í samstarvi við Tryggingareftirlitið:

- Hildið kunningar- og byrjanarfund (temadag) við F&P í 2020.
- Gjørt royndarfráboðanir fyri 2020, 2021 og 2022 við støði í "Omkostningshenstillingen" hjá F&P (seinast LP-information 3/23), við neyðugum tillagingum til føroysk viðurskifti.

Insurance Authority, Skálatrøð 20, P. O. Box 73, FO 110 Tórshavn, Tel +298 35 60 20, Fax +298 35 60 35, www.tryggingareftirlitid.fo

- Hildið fleiri felags eftirmetingarfundir, seinast tann 15. september 2023, har tann endaliga avtalan varð staðfest.

Í allari tilgongdini hava partarnir verið konstruktivir og samstarvssinnaðir, og Tryggingareftirlitið og feløgini eru sera fegin um, at tað nú hevur eydnast feløgunum at gera eina sjálvbodna sínámillum avtalu um ÁKK/ÁKP til gagns fyri einstaka eftirlønarkundan.

Til ber at lesa avtaluna á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum: www.tryggingareftirlitid.fo

**Tryggingarfelagið Lív** **Betri Pensjón** **Lívsverk** **NordikLív**

**Tryggingareftirlitið**